# Hýrurin var róligur

**Djóni Dalsgarð fyri starvsfólkadeildina á Føroya Tele sigur, at hýrurin á starvsfólkunum seinnapartin mikudagin var spentur, men kortini róligur, tá leiðslan boðaði frá, hvørji fólk vórðu uppsøgd**

30 UPPSAGNIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað kom sum ein skelkur. Hópuppsagnirnar á Føroya Tele. Fyrrapartin mikudagin kundi leiðslan á Føroya Tele boða frá, at 30 fólk vórðu søgd úr starvi.

Hvørji starvsfólk talan var um, kundi stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, ikki upplýsa fyrrapartin, tí hann bíðaði eftir aftursvari frá Starvsmannafelagnum. Seinnapartin mikudagin fingu so tey 30 starvsfólkini tungu boðini um uppsagnirnar.

Vit hava spurt eitt umboð fyri starvsfólkadeildina á Føroya Tele, hvussu hýrurin var á starvsfólkunum, tá leiðslan á Føroya Tele boðaði frá, hvørji fólk vórðu uppsøgd.

### Rólig

Djóni Dalsgarð fyri starvsfólkadeildina sigur í stuttari viðmerking, at hýrurin á starvsfólkunum sjálvsagt var spentur á Føroya Tele í gjár, men fólk vóru kortini rólig. Hann heldur, at uppsøgdu starvsfólkini tóku væl tungu boðini, og lupu ikki fram av.

Tá vit hittu Djóna á málið hósmorgunin dugdi hann ikki at siga, hvussu hýrurin var á starvsfólkunum, ið eftir eru á Føroya Tele, tí hann var júst komin inn um dyrnar.

# Sum at detta á sjógv



*Í gjár vóru 30 fólk á Føroya Tele send til hús. Sálarfrøðingurin Eyðun Joensen sigur, at ein uppsøgn nýtist ikki at fáa fók at falla í fátt, hon kann eisini geva fólki eitt skump rætta vegin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Ein uppsøgn kann eisini geva fólki eitt skump rætta vegin. Við hjálp av eitt nú eftirútbúgving, kunnu fólk koma at blóma aftur av nýggju avbjóðingini, sum kann menna tey sigur sálarfrøðoingurin, Eyðun Joensen**

UPPSAGNIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað tekur dygt, tá ið fólk verða søgd úr starvi. Bæði tey, sum verða send heim, og tey, sum eru eftir til arbeiðis, verða hart rakt, og tað tekur tíð, at fáa lagið á arbeiðsplássinum uppaftur. Í gjár segði Føroya Tele 30 fólkum úr starvi, og aðrar stórar fyritøkur hava eisini verið úti fyri at skula senda nógv fólk heim samstundis.

Vit hava spurt sálarfrøðingin, Eyðun Joensen, hvussu ein óvæntað uppsøgn ávirkar, og hvussu eftirsitandi starvsfólkini kenna uppsagnirnar

### Kreppa

– Tað er sum at detta á sjógv. Tú kemur í eina bráðfeingis kreppu, har tað er torført at fóta sær í eina tíð.

Soleiðis lýsir sálarfrøðingurin, Eyðun Joensen, støðuna hjá fólki, ið brádliga hava fingið boðini um, at tørvur er ikki á teimum á arbeiðsplássinum. Hann heldur tað er av stórum týdningi at uppsøgdu fólkunum verður veitt hjálp, tí fyrstu tíðina hava tey ilt við at nýta sítt vit og skil, tí kenslurnar um uppsøgnina fylla nógv.

### Sorg

Tá starvsfólkini á Føroya Tele komu til arbeiðis í morgun, eru tey óivað komin til fleiri tóm arbeiðsborð. Brádliga er persónurin, tú hevur arbeitt lið um lið við í fleiri ár burtur. Vit hava spurt Eyðun Joensen, hvussu starvsfólk kenna tað, tá starvsfelagið í fleiri ár brádliga verður sagdur úr starvi.

– Eg haldi tað var Kirkegaard sum segði, at sorg er kærlighedens pris. Tá tú missir okkurt er vanliga talan um eina sorg. Flestu starvsfólk mugu kenna sorg, tá trúfastir arbeiðsfelagar brádliga eru burtur. Eftirsitandi starvsfólk kunnu eisini hava skuldarkenslur, tí tey seta spurningin, hví júst síðumaðurin varð sendur til hús og ikki eg, greiðir Eyðun Joensen frá.

Hann leggur afturat, at vanliga er tað er sonevnda bíliga arbeiðsmegin, ið fyrst verður send til hús, tá sparingar skulu fremjast, og hetta kann eisini elva til skuldarkenslur.

– Starvsfólk í bíligari endanum hava, sum er, torførari við at fáa endarnar at røkka saman, og tí kann tað kennast svárt hjá hinum starvsfólkunum, at júst tey minni múgvandi verða send til hús. Hetta kann eisini elva til skuldarkenslur, greiðir hann frá.

### Partur av samleikanum

Tá fólk verða uppsøgd hvørvir ein partur av samleikanum hjá uppsagda starvsfólkinum. Eyðun Joensen greiðir frá, at fólk verða altíð fyrst spurd um, hvat tey gera, og ikki hvørji tey eru. Missir tú arbeiðið, er vandi fyri, at partur av samleikanum hvørvir.

– Myndin av einum persóni er ofta tengd at, hvat arbeiði, hann hevur, og hvussu væl hann røkir sítt arbeiðið. Missir tú arbeiðið, verður virðingin fyri persóninum hótt, og tað kann elva til enn størri ampa fyri uppsagda persónin, vísir Eyðun Joensen á.

### Eisini mennandi

Eyðun fortelur, at ein uppsøgd nýtist ikki at fáa fólk at falla í fátt. Ein uppsøgn kann eisini vera mennandi. Hann nevnir sum dømi onkran, sum hevur arbeitt á sama arbeiðsplássi í fleiri ár uttan neyðuga íblásturin, og tá kann ein uppsøgn verða eitt vegamót.

– Ein uppsøgn kann eisini geva fólki eitt skump rætta vegin. Við hjálp av eitt nú eftirútbúgving, kunnu fólk koma at blóma aftur av nýggju avbjóðingini, sum kann menna tey, sigur Eyðun Joensen at enda

# 14 vaskifólk eisini uppsøgd

**- Sjálv eri eg einkja, og tú kennir teg nær um naknað, nú tú um góðan mánað verður arbeiðsleys. Kortini verða vit als ikki nevndar í rokinum um uppsøgdu starvsfólkini á Føroya, og tað kennist svárt, sigur Lena Rasmussen, sum er ein av uppsøgdu vaskikonunum á Føroya Tele**

FLEIRI UPPSAGNIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Hetta er líka hart fyri okkum sum fyri cand. ditt og cand. datt. Vit eru eisini menniskju, men tað er sum um, at vit ikki eru til. Virðingin fyri okkum vaskikonum er undir alt lágmark.

Orðini eigur, Lena Rasmussen, sum seinastu 32 árini hevur starvast sum vaskikona á Føroya Tele. 1. juli verða hon og 13 aðrar vaskikonur arbeiðsleysar. Tolllaksmessudag í fjør fingu vaskikonurnar uppsagnirnar í jólagávu frá Føroya Tele.

Orsøkin til uppsagnirnar er, at Føroya Tele frá 1. juli hevur gjørt avtalu við vaskifyritøkuna, Euro, og tí verður ikki tørvur á teimum vaskikonunum longur.

Lena Rasmussen er øt um, at Føroya Tele ikki hevur grett orð um uppsøgdu vaskikonurnar, tí tær eru eisini menniskjur, sum hon málber. Sjálv hevur Lena rundað tey 60 árini, men framvegis vantar nakað í til pensiónsárini.

– Sjálv eri eg einkja, og tú kennir teg nær um naknað, nú vit um góðan mánað verða arbeiðsleysar. Tað kennist rættiliga svárt, at vit als ikki nevndar í rokinum um uppsøgdu starvsfólkini á Føroya, sigur Lena Rasmussen.

### Ringur hýrur

Í morgun (hósmorgunin, blðm) hevur Lena Rasmussen vaska á Føroya Tele, og hon greiðir frá, at hýrurin á starvsfólkunum er snøgt sagt vánaligur.

– Eg eri von við at vera í góðum hýri, tá eg eri til arbeiðis. Í morgun fekk eg kortini at vita, at eg skuldi ikki ganga runt og flenna, tí støðan í løtuni var einki at flenna at, sigur Lena Rasmussen at enda.



